# Føroyskir borðtennisleikarar til NM

Í døgunum 9.-11. mai verður dystast um norðurlendska meistaraheitið fyri landslið í borðtennis. Kappingin fer fram í Maribo í Danmark, og við til hesa kapping vera sjey føroyskir borðtennisleikarar. Teir eru Fróði Jensen, Rakul Mikkjalsdóttir og Marin í Dali úr TBF, Hallur Thorsteinsson, Ragnar Egilsson og Rói Agnarsson úr TÓR, umframt Sheilu Strøm, sum í løtuni leikar við danska Team Nørreå. Menninir eru komnir í bólk saman við Danmark, Noregi og Finnlandi, meðan kvinnurnar eru í bólki saman við Danmark og Estlandi. Hetta eru sera sterk mótstøðulið, og hóast ikki øll hava valt at nýta sterkastu uppstilling, teljast Danmark og Svøríki millum fremstu borðtennistjóðirnar í Evropa. NM-kappingin verður samstundis seinasta uppgáva hjá norska landsliðsvenjaranum hjá Føroyum, Ole Christian Stenshorne. Eftir eitt hálvt ár í Føroyum fer hann nú aftur til Noregs, og kemur ikki heimaftur til Føroya við føroyska ferðalagnum.

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 14 |
| 2 HB | 6 | 3 | - | 3 | - | 0 | 13 | 2 | 11 | 12 |
| 3 B36 | 6 | 2 | - | 4 | - | 0 | 8 | 3 | 5 | 10 |
| 4 NSÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 8 | 7 | 1 | 10 |
| 5 ÍF | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 9 | 10 | -1 | 10 |
| 6 Víkingur | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 7 | 7 | 0 | 7 |
| 7 KÍ | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 7 | 12 | -5 | 5 |
| 8 B68 | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 4 | 10 | -6 | 5 |
| 9 B71 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 8 | 13 | -5 | 4 |
| 10 Skála | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 4 | 14 | -10 | 4 |

Víkingur-VB 0-0:

# HB-bein uttan mál

*Víkingur*

*HB*

**Triðja Formula-dystin í slag og fyri fjórðu ferð í fimm royndum mátti HB málleyst av vøllinum. Hesa ferð eftir nulloysn í Sarpugerði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Í løtum høvdu víkingarnir eitt hampuliga stórt trýst á HB, men tó at bólturin ferðaðist nakað í feltinum, so gjørdist talan sjáldan um teir stóru møguleikarnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ikki síðani Mortan úr Hørg móti dystarenda skoraði sigursmálið í 2-1 sigrinum á KÍ tann 20.april hevur HB funnið vegin fram til meskarnar.

Síðani hevur liðið spælt gott og væl 270 minuttir, uttan at teir hava funnið vegin fram til meskarnar.

Fyri tað nógva var orsøkin til málturkin eisini sjónlig, tá HB vitjaði í Sarpugerði.

Hóast liðið nú er samansett, so eru hornasteinarnir í spælinum fyri tað n´gova enn teir somu, sum tá GÍ gjørdi um seg. Ikki minst við kontanta spælinum, sum liðið við jarnviljanum leggur fyri dagin, og frá fyrsta bríksli hevði HB ógvuliga trupult at taka ímóti hesum.

Hóast Kári Nielsen í vanligum stíli stríddist væl, so vunnu heimamenninir flestu nærdystirnar, sum vóru á vøllinum. Tað gav eisini yvirskot til at flyta spælið longur fram á vøllin, og fleiri ferðir var upptakt til heilt vandamiklar støður framman fyri HB-málið.

Talan gjørdist tó sjáldan um meira enn tað sama. Ta einu ferðina hoppaði bólturin onkursvegna millum beinini á tveimum víkingum inni í lítla feltinum, men tað var ongan tíð so, at Tróndur Vatnhamar varð settur upp á tær veruligu royndirnar. Fyrst og fremst, tí Hans á Lag aloftast kom við alneyðugu tacklingini í júst tøkum tíma, ella eisini, tí saknurin í einum veruligum boksspælara var sjónligur hjá heimaliðnum.

Og so var um reppið, at HB legði seg á odda beint fyri steðgin, men Hendrik Rubeksen skovlaði bóltin upp um málið, tá hann bráðliga gjørdist leysur við handara stólpa.

### Sørir

At HB-venjarin var ónøgdur um avrikið fyri steðgin, man neyvan vera nøkur loyna.Tvær broytingar vórðu gjørdar í steðginum, og tær munaðu eisini nakað. Eisini hóast Milan Kuljic var heppin, tá dómarin dømdi hann fyri at hava brúkt álbogan í nærdysti, men onkursvegna kom til ta niðurstøðu, at hetta bert skuldi kosta gult.

HB var nú betur við í dystinum, og tó at gøtumenn framvegis høvdu trýstið, so var meira broddur í gestunum. Fleiri ferðir komu teir væl yvir kantarnar, men Geza Turi hevði aloftast tak á innleggunum.

Ikki fyrr enn móti dystarenda kom veruligt glið á. Stutt fyri at hann varð útskiftur, var Andreas Lava Olsen á leið tveir sentimetrar ov stuttur eftir innleggi. Kári Nielsen átti gyltan møguleika fyri gestirnar, tá hann sendi returbólt á tvørtræið, og Hanus Jacobsen, Finnur Justinussen og Rógvi Poulsen áttu allir góðar royndir seinastu løtuna.

Men trupulleikarnir við at finna málið vóru framvegis ov eyðsýndir hjá báðum pørtum. Og so endaði alt á júst sama hátt, sum tað byrjaði. Nevnliga málleyst.

### Vanta broddin

Hjá HB er sjálvandi positivt, at teir hava hildið málið reint nú í níggju av tíggju teimum seinastu hálvleikunum. Men tað er ikki serliga nøktandi, tá mál ikki verða skotin. Og tað verður væl fyrst og fremst hetta, sum venjarin eigur at leggja dentin á komandi dagarnar. Kanska eisini við stuðuli av Andrew av Fløtum, um hesin sleppur av við argandi skaðan.

Hjá Víkingi hevur eisini verið trupult at finna rætta frymilin fram til mótstøðumálið. Men í størri mun tykist hetta at botna í saknin í einum veruligum boksspælara. Onkur tók skemtandi til, at fólk nú eru farin at leita eftir Christian Lundberg. Spæliloyvið hjá dananum er nevnliga enn í Gøtu, men tó at tað neyvan verður við honum, at Víkingur styrkir seg, so vildi hann verið júst rætta typan, sum kundi skotið liðið longur upp eftir talvuni.

## FAKTA um dystin

**Víkingur-HB 0-0**
**Dómari:** Rúni Gaardbo
**Víkingur:** Geza Turi – Kaj Ennigarð, Atli Gregersen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen – Símun Louis Jacobsen (Sverri Jacobsen, 75.), Sølvi Vatnhamar, Sam Jacobsen, Magnus Skoralíð – Andreas Lava Olsen (Finnur Justinussen, 70.), Zoltan Bukzegi
**Gult kort:** Eingin
**HB:** Tróndur Vatnhamar – Mortan úr Hørg (Pætur Jørgensen, 71.), Hans á Lag, Fróði Benjaminsen, Poul Thomas Dam (Rasmus Nolsøe, 46.) – Jákup á Borg, Kári Nielsen, Ólavur S. í Ólavsstovu (Milan Kuljic, 46.), Rógvi Poulsen – Christian Høgni Jacobsen, Hendrik Rubeksen
**Gult kort:** Milan Kuljic

## Vinna miðvøllin

Sam Jacobsen hjá Víkingi helt, at javnleikurin móti HB væl var nakað, sum liðið kundi liva við.

- Bæði og. Vit hava kjansirnar til at vinna dystin, men ein javnleikur er væl í lagi.

Tað sá út til, at tit fyrst og fremst fóru eftir miðvøllinum, og síðani arbeiddu út frá hesum?

- Tað var eisini ætlanin. Vit hava havt nakrar dystir, har vit hava vunnið miðvøllin, og tá hevur spælið gingið væl. So tað var fyrst og fremst hetta, sum var ætlanin, og tað eydnaðist. So á tann hátt eru vit nøgdir, segði Sam Jacobsen eftir dystin.

## Ikki nóg gott

Tríggjar dystir uttan at liðið ger mál. Tað er ikki nøktandi fyri ein landsliðsáleypara. Og als ikki, tá mann spælir í HB, staðfesti Christian Høgni Jacobsen eftir dystin.

- Tað er snøgt sagt ikki gott nokk. HB er kent fyri at spæla álopsfótbólt, og tað haldi eg manglar í løtuni. Vit koma fram til nakrar møguleikar, men vit fáa ikki bóltin inn.

- Hinvegin halda vit nullið, og mann kann ikki seta ein fingur á verjuna. Tað er kanska munurin á okkum í mun til í fjør. Nú ræður so um at fáa bóltin í kassan, so vit fáa glið á aftur.

Og enn eru tit ikki krøktir av í oddinum?

- Slettis ikki. Har eru bara tvey stig upp, so fáa vit málini, ivist eg ikki í, at vit væl og virðiliga eru við í oddinum, segði Christian Høgni Jacobsen.